Dagfesting: 05.mars 2024

# Starvslýsing

# Reingerðarfólk til Stropan.

Fuglafjarðar kommuna sóknast eftir einum dugnaligum reingerðarfólki til reingerð á dagstovninum Stropanum, at byrja skjótast gjørligt.

## Um starvið

Starvið inniber alla dagliga reingerð á dagstovninum og talan er um helvtina av stovninum, har tit eru tvey starvsfólk, sum gera reint.

## Førleikakrøv

Vit vænta, at viðkomandi hevur hesar førleikar :

- Royndir innan reingerð. (Hettar er tó ikki eitt krav) 1
- Er blíð/ur, fyrikomandi og møtur væl upp
- Er álítandi og ágrýtin
- Hevur góð samstarvsevni og er hjálpsom/samur
- Hevur gott eyga fyri røkt og sær hvar tørvurin er.

## Setanar- og lønarviðurskiftir

Talan er um farloyvisstarv og royndartíðin er 3 mánaðir. Tímatalið er 13,5 tímar um vikuna og arbeiðstíðin er eftir kl 17.00.

Starvið er tímalønt, og verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og KAF.

## Fleiri upplýsingar um starvið

Eru spurningar viðvíkjandi starvinum, so eru tit vælkomin, at seta tykkum í samband við Lindu á Horni, samskipara av reingerðini, á tlf. 238094 ella linda@fuglafjordur.fo.

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

## Umsóknin skal sendast til

Skrivliga umsóknin, saman við CV, møguligum viðmælum skal sendast við vanligum posti til :

Fuglafjarðar kommunu

Í Støð 5

530 Fuglafjørður

Ella við telduposti til :

info@fuglafjordur.fo

## Freistin, at søkja starvið

Umsóknir skulu vera Fuglafjarðar kommunu í hendi í seinasta lagið 19.mars 2024 kl 12.00.